# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kærleikans dansikvøld við Scandinavia og Spaðar 5

**Leygarkvøldið 19. januar bjóðar Róðrarfelagið Knørrur til stórfingið dansikvøld í ítróttarhøllini á Hálsi við norska superbólkinum Scandinavia og føroysku legendunum í Spaðar 5**

DANSUR
*Tíðindaskriv*




*19. januar verður kærleikans dansikvøld á Hálsi við norska superbólkinum Scandinavia og føroysku legendunum í Spaðar 5*

Scandinavia, sum júst hevur givið út fløgu, er ímillum kendastu dansiorkestur í Noregi og hevur fingið fleiri heiðurslønir og gullplátur fyri tónleik sín. Og løgið er tað ikki, tí fleiri av limunum hava spælt saman líka síðan 1988, tá ið orkestrið varð stovnað. Hesa tíðina hava teir eisini haft fleiri enn túsund konsertir um øll Norðurlond, so talan er kanska um best samanspælda dansiorkestur yvirhøvur.

Á føroyaferðini verður orkestrið fullmannað við Eirik Johansen, gittar og sang, Steinar Storm Kristiansen, tangentar og sang, Pål Fuglseth Tautra, bass og sang, Ronny Jakobsen, trummur og sang, Bjørn O. Jensen, saksofon og sang, og Finn Jacobsen, gittar.

Eisini Spaðar 5 við Ólavi Øster og hansara monnum stillar upp við sterkastu manning, so borðreitt verður við góðum svingtínum og sjelarum alt kvøldið.

Róðrarfelagið Knørrur, sum leggur lunnar undir dansin, vónar, at fólk fær eitt hugnaligt kvøld saman. Avlopið frá tiltakinum fer alt til ungdómsvirksemi felagsins.

Forsølan til er longu byrjað, og atgongumerki fáast í bensinstøðum kring alt landið. Væntandi kemur nógv fólk saman, so tey, sum vilja tryggja sær eitt atgongumerki, hava høvið at keypa tað í góðari tíð.

# Nýggjur leikur við TVAZZ

**Fundamentalisturin er heitið á nýggjum leiki, sum sjónleikarfelagið TVASS venur í hesum døgum**

SJÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fundamentalisturin er heitið á nýggjum leiki, sum sjónleikarfelagið TVASS venur í hesum døgum.

27. oktober 2007 hevur TVAZZ frumsýning av leikinum Fundamentalisturin, sum er ein finskur leikur frá 2006. Fundamentalisturin hevur higartil bert verði framførdur í Finlandi, har hann varð sýndur yvir 100 ferðir fyri fullsettum húsum. Juha Jokela leikstjórnaði sjálvur finsku uppsetingina, og vitjar hann eisini í Føroyum til frumsýningina.

Fundamentalisturin er ein leikur um trúgv. Men eisini ein leikur um tvey leitandi menniskju og samband teirra millum, teirra vónir, sannføring, kærleika og glatan og ikki minst teirra samband við Kristnu trúnna og tulking av Bíbliuni.

Hvat kostar tað at tilogna tær eina trúgv fult og heilt?

Hvat kostar tað at missa trúnna?

Hvat er sonn frelsa?

Hvør av teimum er fundamentalisturin?

Eru bert nakrir av spurningunum, sum leikurin setur.

Hesi bæði kristnu menniskjuni leita eftir sannleikanum – í átrúnaðinum, í hvørjum øðrum og í sær sjálvum. Her av stendst ein samanbrestur, sum fær óbótaligar avleiðingar fyri bæði tvey. Ein samanbrestur, sum vit stundum eisini síggja um okkara leiðir?

Leikarar eru Bárður Persson og Gunnvá Zachariasen. Leikstjórin er sviin Petra Berg Holbek og ljós –og pallsniðgevi er Egil B. H. Hansen.

Forsølan av atgongumerkjum er byrjað í Kunningarstovuni á Vaglinum í Havn.

Sí annars www.tvazz.com

Lesið Sosialin -so eru tit við!




# Bót til bata opið hús

TÍÐINDASKRIV

Á fjórða sinni bjóðar sjálvhjálparbólkurin Bót til bata øll kvinnum, ið eru skurðviðgjørdar fyri bróstkrabbamein, til tiltakið Opið hús í felagshúsinum hjá Krabbameinsfelagnum. Felagið vil fegið røkka so nógvum kvinnum, ið hava ella hava havt bróstkrabba, sum til ber; tí vónar bólkurin, at nógvar kvinnur taka av tilboðinum. Endamálið er at hava eina hugnaliga løtu saman, har møguleiki er fyri at tosa, stuðla, hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp. Og royndirnar eru, at kvinnurnar eru fegnar um at koma saman á henda hátt, siga umboð fyri Bót til bata.



*Margret Mortensen, ráðgevi hjá Krabbameinsfelagnum*

Bót til bata er sjálvhjálparbólkur undir Føroya felag móti krabbameini. Bólkurin varð stovnaður í 1988 og hevur verið virkin síðan. Í bólkinum eru kvinnur, sum eru skurðviðgjørdar í brósti. Tær hava fingið upplæring í at veita stuðul, vegleiðing og ráð til aðrar kvinnur, ið skulu skurðviðgerast ella eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.

Opið hús verður í hølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Tórshavn týskvøldið 23. oktobur 2007 kl. 19.00. Hevur tú hug at taka lut, vinaliga boða frá á telefon 317959, 217959 ella 217957, ella í telduposti: ffk@krabbamein.fo